– trygt og ómakaleyst til hús

INNI



# Sera snotilig og dámlig hús á Argjum

**Húsini sýnast ikki av so nógvum við fyrsta eygnakasti, men far ikki skeivur – tey eru frálík, sera væl hildin og í góðum standi.**









## Umhvørvi

Tú koyrir út á Argir niðan móti AB-vøllinum og sneiðir til vinstru niðan í Reynstún. Har finnur tú hesi frálíku húsini, ið við fyrsta eygnakasti ikki sýnast av so nógvum. Men far ikki skeiv/ur og gev tí ein kjans, tí komin niðan til húsini og inn, sært tú við tað sama, at hetta eru eini dygdargóð hús við mongum møguleikum til bústað, virksemi og trivnað. Húsini standa í náttúruvøkrum, friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við góðum grannalagi. Dagstovnar, skúli, fótbóltsvøllur og busssamband er nær við. Har er frálíkt útsýni yvir Havnina og út í Havnadal.

## Ljós og luft

Húsini standa væl í mun til sólargang, ljós og luft. Tú hevur sólina allan dagin. Í túninum aftanfyri húsið er tað sum í eini grýtu ein góðan dag, og altanin frammanfyri við útgongd úr stovuni gevur góðan møguleika fyri at fáa luft og ljós, tá ið tú vilt. Vindeyguni geva nógv ljós inn og frálíkt útsýni út, men tey eru býtt upp við sprossum, so tey samstundis undirstrika blíða arkitekturin og prýða húsini, og sjálvt um tú sært væl út og hevur samband við umhvørvið uttanfyri, kanst tú væl og virðiliga vera ósædd/ur og í friði inni hjá tær sjálvum.

## Stílur og snið

Inni er stílurin lættur og ljósur, men ber eisini brá av tyngd og dygd við tað, at gólv, loft og hurðar eru úr træ. Alt er sera snotiligt og sera væl hildið. Húsini eru gjørd úr góðum tilfari við góðum handverki. Mekaniska luftskipanin syrgir fyri, at luftin inni er frísklig og góð. Her kunnu húsfólk í øllum aldrum og við mongum ymiskum áhugamálum liva og trívast. Í ovaru hædd er felagsøki til alla familjuna, hjúnarrúm og barnakømur við felags baðirúmi við bæði brúsu og baðikari. Í niðaru hædd er stova / kamar og ítrivsrúm við egnari inngongd og kjallararúmi, ið væl kann innrættast, so niðara hædd verður ein sjálvstøðug íbúð, um tørvur er til tess. Húsini eru dagførd í 1994 og aftur seinni og eru sera væl hildin, so tey sýnast sum nýggj.

## Uttanfyri og uttanum

Alt er sera snøgt gjørt uttanfyri. Garðarnir eru úr laðaðum gróti og út beton, og alt er gjørt soleiðis, at tað er lætt at halda. Bilhúsið gevur góðar møguleikar at halda bilin og vera virkin við ymiskum handligum virksemi.

## Innrætting

Í ovaru hædd er hjallur, inngongd, gongd / trappugongd, gestawc, 2 kømur, baðirúm, hjúnarrúm, matarkøkur og borðsstova / stór stova við útgongd til altan. Í niðaru hædd er inngongd, gongd, stova, ítrivsrúm og vaskirúm / goymslurúm / kjallararúm. Hartil er garaga er uttanfyri.

## Fakta

**Addressa:** ...........Reynstún 23, Argir
**Byggiár:** .............1983 / 1994
**Hæddir:**...............2
**Gólvvídd:**.............240 m²
**Grundøki:**............550 m²
**Hjallur:** ................Ja
**Bilhús:**.................Ja
**Prísuppskot:**...... kr. 2.300.000









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**